# Skemt



# Hesin lendir neyvan aftur

Lívið snýr seg lutvíst um, hvønn vinkul mann velir at síggja og uppliva tað frá. Soleiðis er eisini við myndamonnum. Her hevur ein fotografur hjá AP verið til skíðkapping í Týsklandi, og hann hevur fingið eina sannførandi mynd av einum skíðari á flogi. Eingin, sum sær hesa myndina ivast í, at skíðari kann flúgva til jarðarinnar enda. Kundi onkur kreativur fotografur ikki tikið eina mynd av landskassanum, so hann sá út til at verða á tremur í allar dagar og tímar hereftir. Mynd: APPhoto/Frank Augstein

## Hvussu við siglandi flogførum

**Útvarpið bar herfyri tey tíðindi, at nýggj og strangari krøv verða sett flogførum, sum skulu til ella úr USA. Útvarpsmaðurin segði soleiði: *Eftir bomburoyndina í amerikanska flogfarinum, hevur USA sett strangari krøv til flogfør, sum koma flúgvandi til USA.* Einki var sagt um, hvørt krøv eisini verða sett eitt nú siglandi ella koyrandi flogførum.**

## Hvat kann eg gera?

Ein eldri maður fór til læknan til árliga kanning. Lækin hevði ikki góð boð at bera honum.
- Vit hava tíverri funnið út av, at tú ert so sjúkur, at tú hevur bert seks vikur eftir at liva í, segði læknin.
- Hvat? Eg havi tað fínt, havi ikki havt tað betri í nógv ár. Tað kann ikki passa. Er tað einki, sum eg kann gera, spurdi maðurin.
- Jú, tú kundi kanska farið til heilsurøktina og tikið eitt runubað hvønn dag.
- Fer tað gera meg frískan?
- Nei, men so kanst tú venja teg við at liggja í mold.

## Í RANGASTRÚPAN

**Ruddið forsíðuna!**
Ber til at síggja HM í hondbólti á netinum
*portal.fo*

**Safir ger comeback**
Ikki tvingast til at brúka høgru
*portal.fo*

**Bygdamenn kunnu keypa seg inn**
Ein gøta í Havn er til sølu
*Sosialurin*

**Live-frásøgn?**
John Petersen nærkast B36
*Sosialurin*

**Paradoks**
Hvat er galið við einum flottum, naknum kvinnukroppi í føroyskum klæðum.
*Portal.fo*

**Hvønn vendir hann so bakið til?**
Gerhard vendir sær til baklandið
*Sosialurin*

**Framvegis ein løgreglumaður**
Ikki minni løgregla á Sandi
*Dimma*

**Hvat er hent?**
Føroyar eru ósjónligar í Danmark
*Sosialurin*

**Tað var ikki gamalt**
Eik verður ein varin og konservativur banki
*Kringvarp.fo*

**Stór lokal søga!**
Valdi Klaksvík fram um Havnina
*Norðlýsið*

**Ruddið forsíðuna**
Løgreglan handtikið ein mann
*portal.fo*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Vilstur í jólahugna

Aftur og fram eru líka langt – ella lík stutt.

Eitt av hesum hálvbýttu orðatøkunum, sum illa ber til at taka í álvara, hóast tey verða marknaðarførd sum bíbilskur sannleiki.

Og tó. Umskrivað nakað ber til at siga: far altíð somu leið aftur sum fram. Altíð, tí so villist tú ikki.

Hetta er fyrsta boð hjá okkum, sum ikki hava ættarskil. Annars villast vit.

Seinast, tað hendi mær, var tolláksmessukvøld í lítla týska býnum Goslar í Harzen.

Eg fór út um kvøldið. Á gamla torgið, har sum tey høvdu eina sera hugnaliga jólabygd við nógvum búðum, sum seldu glühwein og aðrar kókandi heitar drykkir við prosentum í.

Eg hevði plottað eitt vertshús fyrr um dagin, og ætlaði inn har á vegnum heim aftur á hotellið.

Eftir glühweincrawling, sum endaði við búðina við kirkjuna undir høgum trøum, avtaktum í kava og ljósperum, helt eg, at nú var stundin komin at fara.

Eg loysi og leggi av stað, uttan at hugsa nakað serligt um kósina, eg seti. Tað var jú hendan vegin, eg kom inn á torgið. So altíð, altíð, somu leið aftur sum fram.

Eftir eina gangandi løtu undrist eg so líðandi á, at eg kenni einki aftur, her eg gangi. Hvar er hasin handilin ella hin? Eiga teir ikki at vera júst her á leiðini?

Í staðin fyri at venda aftur somu leið, geri eg tað fatala mistakið, at eg snari inn í eina aðra gøtu, og so aftur í eina aðra. Og so eri eg vilstur, fullkomiliga lost.

Illgongt er í kavanum og forbannað hált eisini. Eg reiki í smølum gøtum, aftur og fram, neyvan líka langt. Veit bara, at her havi eg ikki verið fyrr.

Summi hava kumpass við, tá tey ferðast, eisini í býum. So villast tey ongantíð, siga tey.

Men kumpass gjørdi ongan mun, her eg eri horvin millum miðaldarhús við jólaskreyti í smáu gluggunum, hugnaligt, hugnaligt, men tað sansi eg als ikki.

Eg havi ongantíð skilt prinsippið hjá einari kumpass, hóast eg var gulur úlvaungi (hví eitur tað ikki úlvahvølpur?) fyri hundrað árum síðani.

Í øllum jólaljósinum er tað ein glotti, at absintið, eg drakk undir jólatrøunum, var bara absint wannabelookalike. Tað var ikki 85%, sum absint eigur at vera. Tíbetur, tí so var ikki bara ættarskilið horvið.

Men út aftur skal tað kortini. Og í Týsklandi er forboðið at pissa aðra staðni enn heima við hús, á hotellum ella vertshúsum, uttan at gjalda fyri tað, minst hálva evru.

Men her er eingin at taka móti pengum, einki hotell, einki vertshús. Nei, her gerst ikki annað enn at fara millum tveir bilar og lita kavan.

"Don´t eat the yellow snow," yrkti Frank Zappa í sangi sínum um eskimoarnar.

Gangi og gangi. Havi ikki bindindi til at steðga á og vera hugtikin av aldagomlu húsunum, sum kringseta meg og flenna at mær. Fyrsti ferðamaður, sum er vilstur í Goslar.

Hetta er ein ræðulig støða at vera í hjá einum 88% autisti sum eg eri, ella, fyri at vera politiskt korrektur, einum manni, sum ber autismu, 88%.

Nú noyðist eg at spyrja onkran, hvar Hotel der Actermann er.

Jú, jú, tað er handan vegin, men tað er rættiliga langt.

Aftur at reika. Og so, við eitt, av berari tilvild sjálvandi, eri eg aftur har, sum eg kenni meg aftur, á torginum. Finni gøtuna, sum leiddi meg higar fyri minst tveimum tímum síðani. Og seti beina kós á plottaða vertshúsið. Ja, beina kós veit eg ikki. Men eg gangi ta varðagøtuna, sum eg kenni. Uttan iva er onkur styttri leið. Men, nei takk.

Innan fyri barrdiskin er Sabine. Sigoynari, kolasvarta hárið sum Svartifossur ein illfýsnan dag, eyguni eisini svørt, svakliga vøkur sum ein gudinna úr helviti.

Eg eri bjargaður.